3 frá 3'aranum
FLØGUUMMÆLI

DAGFINN OLSEN

Enrique Iglesias



Tey tilkomnu kenna pápan. Tiltikni smørtenorurin vi› eftirnavninum Iglesias, i› hevur fingi› fingi› kvinnuknø› um allan heim at vikna.

Nú er seinna ættarli› komi› fram og væl hevur gingist. Enrique leikar vælljómandi popp, vi› su›urlendskum rútmum. Onkur kanska freistast at kalla hetta søtsúpan, men ikki tekst frá honum, at hann dugir. Bæ›i at syngja og at skriva løg. Løgini eru gó› og tey sita skjótt í merginum.

Ta› tykist ikki, sum er hann bangin fyri at ganga somu lei›ir, sum pápin. T.d. lagi› I have always loved you kundi eins væl veri› eitt lag til eldra Iglesias. Men ta› krevur mót at ganga somu lei›ir. Men Enrique gevur eisini naka›. Ein n‡ggjari dámur er yvir hesum og ta› er ikki bert orsaka› av nútímans tøkni. Hann er egin harri, hóast sonur pápa sín.

Gó›ur poppur vi› gó›um og eggjandi rútmum og sponskum guitarum. Ein bleyt og vælljómandi fløga, har Enrique eisini syngur saman vi› Whitney Houston.

Michael Bolton
Timeless
The Classics vol.2



Michael Bolton kom av álvara fram í áttatiárunum. Hann sta›festi seg skjótt, sum ein sangara av teimum heilt gó›u. Men tó eisini so egin í rødd og stíli, at hóast hann fanga›i brei›a fjøld, so náddi hann ikki aftur á aftasta bonk.

Solei›is er ta› vi› so mongum. Summum dámar at seta eina fløgu vi› Peter Belli á. Onnur orka hann ikki. Uttan at samanbera Bolton og Belli, so er ta› júst hetta, i› ger seg galdandi eftir mínum tykki. Antin elskar tú sangir og sangara, ella orkar tú ikki fyri hesum. Har er eingin vegur ímillum.

Sjálvsagt kann ta› bo›a frá gó›um. Her er ein sangari, i› er sín egin. Ger ta› hann hevur hug til og á sín serstaka hátt.

Gamaní. Eg kundi heldur ikki funni› uppá at sagt, at Bolton ikki dugir at syngja. Tí ta› dugir hann avgjørt. Ta› er bara so hjá mær, at eftir at hava hoyrt Bolton passaliga leingi, so er ofta so, at hann ljó›ar sum ma›ur í havsney›. Eg skal, sum sagt, ikki leggja hann undir ikki at duga at syngja, tí hann dugir og hevur avbera gó›a rødd. Men! Hví skal hann alla tí›ina syngja høgt og draga tónarnar, sum var hann í svárari pínu.

Havi á›ur hildi›, at hóast Bolton ikki júst seg›i mær naka›, so var okkurt vi› honum. Dygd. Væl freimleiddar fløgur. Gó›ur tónleikur. Gó›ur sangari.

Gó›ur sangari er hann ivaleyst enn. Krúllurnar eru burtur. Hári› er stutt nú. Eisini grátt. Hann er vaksin!

Og á n‡ggju fløguni syngur hann klassikarar, i› flest øll kenna. Óiva› rabarbugreytur fyri tey, i› dáma Bolton. Og ta› er gott. Gó›ur sangari, væl framleitt. Ljó›ar væl.

Men skuldi eg lagt kósina, so he›i eg roynt at givi› løgunum okkurt n‡tt. At hann skal syngja tey einafer› enn, sum onnur hava gjørt ta› undan honum, tykist mær ke›iligt.

Men fløgan er gó›, sum tann hon er. Ein vælljómandi Bolton fløga. Ta› er gó›ska í sjálvum sær. Hesafer› kenna vit enntá løgini frammanundan, og kunnu syngja vi›. Víst er talan um gó›sku og tónleik á høgum stø›i. Ikki n‡skapandi, men gott, trygt og kent.

Cher
The greatest hits

Cher. Hon er fantastisk. Solei›is ver›ur ofta sagt.

Summi fólk kalla tey "korkproppmenniskju". Cher tykist vera ein av hesum, saman vi› t.d. Tinu Turner, Jacob Haugaard og John Travolta. Uttan at samanbera ví›ari.

Tey kunnu falla, eru burtur eina tí›, men altí› reisast tey aftur. Kanka betri enn nakrantí›.

John Travolta spældi Grease og hvarv so eini 10 ár. Kom so øgiligur aftur. Haugaard kom úr tunnuni og er uppi enn. Tina Turner hev›i lív á palli saman vi› manninum Ike Turner. Hann fór tó ila vi› henni og førdi fram, at hann hev›i eitt navn, á›renn hon kom uppí. Sí›ani fór Tina frá misn‡taranum Ike. Hon hvarv. Hann hvarv. Hon kom aftur og í dag kenna øll Tinu Turner. Onkur minnist Ike.

Øll kenna eisini Cher. Men hon hevur mestsum veri› frammi alla tí›ina, sí›ani hon og táverandi ma›urin Sunny sungu lagi› I got you babe.

Hetta lag er eitt av teimum mongu hittunum, i› er á n‡ggju fløguni hjá Cher. Her er ein fløga, i› er sonn perla. Her eru løg sum Believe, Shoop shoop song, Heart of stone, Just like Jesse James, Walking in Memphis og If I could turn back time.

Cher, sum er farin framvi› teimum fimti árunum, hóast ta› ikki sæst so væl, sigur teimum flestu okkurt. Yngri og eldri. Ta› sæst eisini á hesi fløgu, har elsta lagi› er úr sekstiárunum og n‡ggjasta var frammi fyri okkurt um einum ella tveimum árum sí›ani.

Viðmerking:

Ov lítið varð játtað

Í sambandi við trupulleikarnar í Sjúkrahúsverki Føroya, hava nógvir spurningar, gitingar og meira ella minni almennar frágreiðingar frá ymiskum persónum verið á lofti.

Fyri okkum fíggjarnevndarlimum er spurningurin tó heilt greiður: **Ov lítið er játtað til sjúkrahúsverkið, sum ongatíð er komið aftur á beint aftaná ógvusligu inntrivini í sambandi við kreppuna. Tá manglaðu pengar í landskassanum, tað ger tað ikki í dag!**

At vísa á og brúka sum umbering frá landsstýrisins síðu, at "hetta var karmurin eg fekk.." sum var tað ein nýggjheit, kanska komin úr erva ,er at fara ov lætt um spurningin, tí at tørvurin var væl størri, tað vistu bæði landsstýrislimir og fíggjarnevndarlimir. Harumframt hevði trivnaðarnevndin undir viðgerðini fleiri viðmerkingar til tølini, og minnilutin í trivnaðarnevndini vístu ítøkiliga við framrokningum í sínum tilmæli á, at tørvurin var nógv, nógv størri enn játtanin loyvdi.

Broytingaruppskotini

Tí kom minnilutin í fíggjarnevndini, sambands- og javnaðarumboðini, við broytingaruppskoti, har 11 mill. kr. vóru játtaðar meira til sjúkrahúsini. Víst varð á tilsvarandi sparingar m.a. til sjálvstýrisfyrisiting, studning til endurnýgging av fiskiskipaflotanum o.a.

Sum øllum kunnugt varð alt sópað av borðinum, sum minnilutin kom við í fyrsta umfari, t.v.s. við 2. viðgerð á løgtingi tann 16 december.

Norðoyatingmenn í samgongu fingu tó trumfað ígjøgnum, at játtanin til Klaksvíkar Sjúkrahús varð hækkað, og tað skal vera teimum væl unt, men munur var á vælvildini til hini bæði sjúkrahúsini, og tí fingu vit teir trupulleikarnar, sum vit hava sæð seinastu dagarnar.

Ein seinasta roynd at bøta um var gjørd við 3. viðgerð tann 20 december, og tá vóru nakrir samgongulimir vaknaðir, so nøkur av uppskotunum frá minnilutanum vóru samtykt í eitt sindur broyttum líki, men uppskotini um meirjáttanir til sjúkrahúsið í Suðuroy og Landssjúkrahúsið, ávikavíst 1,9 mill. og 4,5 mill. kr. vóru feld. Tað skal standa fast!

At nógvar umbønir um eykajáttanir koma heilt skjótt ivast vit í Sambandsflokkinum onga løtu í - tað gjørdu vit eisini vart við í viðmerkingunum í fíggjarnevndarálitinum.

Rakar tey óseku

Framferðarhátturin hjá sitandi samgongu er sera óheppin og rakar tey óseku.

Eitt av skjølunum, sum trivnaðarnevndin fekk undir viðgerðini av fíggjarlógini (og sum kann lesast á Internetinum) er skriv frá sjúkrahúsleiðaranum til Almanna- og Heilsumálastýrið dagf. 12 oktober . Her sigur sami leiðari í sambandi við møguligar sparingarm.a.: "…tað er tó heilt greitt, at við hesum fara vit aftur í ár inn í eina ringrás, har vit hótta starvsfólkið, og skulu vit taka gongdina undanfarin ár sum forsøgn, hevur tað verið uttan grund, tí at enda broyttist fíggjarkarmurin og eftir var bara ágangurin á starvsfólkini…"

Søgan er við at endurtaka seg aftur í ár!

Okkara partur skal so ikki liggja eftir, um umbønir um eykajáttanir til hetta øki koma, men tað er átaluvert at farið verður fram á tann hátt, sum nýttur er.

Ikki er neyðugt at spyrja leiðandi landsstýrismenn okkara, hví soleiðis er vorðið. Vit kenna svarið!

Men okkara viðmerking er: nei - tað verður ikki betri, tá vit fáa fullveldi, tvørturímóti. !!

Lisbeth L. Petersen og Flemming Mikkelsen, Sambandsflokkurin

Um summarið er umsetningurin í ferðavinnuni 100 milliónir kr

Fyrstu greinaðu úrslitini av hagtalskanningini hjá Bornholms Forskningscenter, sum Ferðaráð Føroya hevur umbiðið, vísa at virðið av ferðavinnuni í tíðarskeiðnum mai til og við september er 101.130.263 kr, og at tað í sama tíðarskeiði eru í miðal 358 fulltíðarstørv í ferðavinnuni.

Ferðafólkini leggja runt roknað 73 mill. kr eftir seg og er henda beinleiðis nýtslan hjá ferðafólkunum at sammeta við eina inntøku, vit fáa við t.d. at selja fisk til útlandið. Kanningin vísir, at tað eisini er ein óbeinleiðis nýtsla, sum hevur eitt virði uppá slakar 30 mill. kr. Hetta snýr seg t.d. um pening, sum eitt hotel letur einum hándverkara fyri tænastu ella eitt vørukeyp frá einari heilsølu.

Arbeiðsplássini í ferðavinnuni eru í miðal 350 um mánan, meðan tey arbeiðspláss, ið eru óbeinleiðis knýtt at ferðavinnuni eru 8 í tali. Sum dømi um óbeinleiðis arbeiðspláss kann aftur nevnast handverkarin, ið arbeiðir á einum hotelli.

Hagtalskanningin skal nýtast í tí ferðavinnupolitikki, sum Vinnumálastýrið er í ferð við at orða. Tølini kunnu fyrst og fremst staðfesta týdningin av ferðavinnuni og harnæst nýtast til at seta nýggj mál.

Í desember 1999 løgdu, sum kunnugt, umboð frá Bornholms Forskningscenter fyrstu hagtølini frá kanningini, sum Ferðaráð Føroya hevur umbiðið, fram. Hesi tøl vístu, at stívliga 21.000 ferðafólk vitjaðu Føroyar frá mai til og við september, og at tey høvdu umleið 200.000 gisitingar. Vit vita nú at siga, at býtið millum tey ferðandi er soleiðis:

slag av ferðandi	tal	gistingar
handilsferðandi	5776	40936
útisetar	3627	64571
ferðafólk (‚turistar')	6471	62859
feria/vitja vinir+familju	2753	27992
vitja vinir+familju	425	3700
onnur, t.d. skúlaflokkar	1633	16755

‚Ferðafólk' eru tey, sum ikki hava bústað í Føroyum, og sum sæst niðanfyri teljast umframt ‚turistar' m.a. eisini handilsfólk og útisetar millum tey ferðandi.

Kanningin vísur, at tey ferðandi steðga í miðal 8 dagar, og at tey í miðal nýta 5.329 kr á ferðini. Bornholms Forskningscenter veit at siga, at hesi tøl eru høg samanborið við onnur ferðamál.

Ferðafólkatalið er sum kunnugt lægri enn væntað, men virðið av hesum ferðandi er hinvegin hægri enn væntað. Útlitini fyri at fáa munandi fleiri ferðafólk til Føroya eru góð, og harvið møguleikarnir at fáa nógv størri inntøkur til landið.

Niðanfyri síggjast tey tøl, sum Ferðaráð Føroya júst hevur fingið frá Bornholms Forskningscenter. Hagtølini er bert galdandi fyri tíðarskeiðið mai-oktober, men

um eitt ár fæst meiri nágreiniligt at vita, hvussu tølini fyri føroyska ferðavinnu síggja út fyri eitt heilt ár.

**Vinarligar heilsanir,
Ferðaráð Føroya**

**Annika Wardum
Joensen stjóri**

Loksins kom hon



Loksins kom hon, og nú hon er komin, undrast tú stórliga, hví eingin hevur skrivað eina tílika bók fyrr, men sjálvandi, at skriva tílíka bók er stórarbeiði, sum ikki er nógvum í kjøti borið at hætta sær undir.

Kortini er bókin løtt at lesa, spennandi og undirhaldandi.

Hesa bók sleppur hvørki hann ella hon og enn minni skúlarnir undan, at um ikki trálesa so týða til go leita í henni. Og hon er løtt at leita í. Frálíkt yvirlit og góður listi við leitiorðum. Yvir átta síður við keldutilfari.

Ein bók til leik og lærd. Ein bók sum verður standandi. Og ein bók sum setti navnið á høvundanum í søgu okkara.

Eisini ein bók sum danski forsætisráðharrin verður kunnaður um, og kanska eisini vil skeita í, tá ið hon um stutta tíð er komin út á enskum.

Men so løgið kann lívið vera, at bert Oyggjatíðindi hevur ummælt bókina.

Um hini bæði bløðini ikki beinleiðis ummælti bókina, tað er ikki altíð lætt at fáa ummælarar, kundu tey tikið okkurt úr henni. Umrøtt hana onkursvegna. Spurt okkara politikkarar, um teir høvdu lisið hana o.s.fr. Tað eru nýggjheitsvirðir í henni. Yvirskriftir til fleiri forsíður, sum høvdu selt. Hví teir ikki gera tað, kann hin einstaki sjálvur gita um. Her eru til fleiri Fimmarar og Krosskøst, men tey loypa ikki burtur og fara sjálvandi at koma. Jól hava verið.

Láturin er gott vápn, royna at gera okkurt láturligt, sum tú vilt basa, er gamalt, men heldur ikki tað er brúkt móti bókini. Tað hevði eisini dottið aftur á ein sjálvan. At tiga hana burtur er lættari sagt enn gjørt, tí bókin er væl seld og fleiri hava longu lisið bókina.

Hetta endaleysa kjakið um Danmark - Føroyar er við hesu bók um ikki beint av vegnum so fingið ein góðan veg at ferðast á.

Tað er ikki romantiskt ella veruleikafjart at vilja hava skipað viðurskifti við Danmark.

Tvørtur í móti. Vit hava einki val. Nú mugu vit fáa skipað viðurskifti við Danmark, sum halda juridiskt eisini í altjóða viðurskiftum.

»Nógv orðaskifti hevur verið í Føroyum um okkara støðu í heimssamfelagnum. Sagt verður, at vit eru ein samanrunnin partur av tí danska ríkinum, og onkuntíð hevur onkur sagt, at vit kenna okkum fullkomuliga sum danir. Sagt verður eisini, at vit tann 14. september 1946 á fólkaatkvøðuni gjørdust eitt sjálvstøðugt ríki, og vit síðani hava verið kúgaði. Og so hava vit ein hóp av sjónarmiðum sum liggja ímillum«.

Soleiðis byrjar inngangurin til bókina Føroyar á vegamóti eftir Zakarias Wang. Og seinri í sama inngangi sigur hann: »Nógv av tí, sum hevur verið sagt, hevur víst seg at vera skeivt, og aðrar keldur kunnu hinvegin nýtast í nógv størri mun, tá tað vísir seg, at tær eru haldgóðar«.

Ein í allar mátar frálík bók frá Stiðanum. Kostnaður er bara 200 kr. fyri hetta valaverkið og risaarbeiðið.

Steinbjørn B. Jacobsen

Sámal Petur aftur

Sámal Petur í Grund tók í gjár aftur sæti á tingi

JOHN JOHANNESSEN

Á tingfundinum í gjár tók Sámal Petur í Grund aftur sæti á tingi. Hann hevur havt farloyvi frá tingarbeiðinum síðani november.

Tingmaður Sjálvstýrisfloksins fekk brádliga blóðtøpp, tá hann í november var og skjeyt harur. Hann varð í skundi fluttur á Landssjúkrahúsið, men kom skjótt fyri seg aftur. Tó tók Sámal Petur í Grund farloyvi frá tingarbeiðinum eina tíð, meðan hann styrkti

seg aftur.

Varamaður fyri Sámal Petur í Grund var Kári Højgaard.